# Úr India til Vágs í føðingardag

TÁ IÐ INDISKI LÆKNIN, **RATNAKANT PATIL**, KOM TIL VÁGS Í 1970, DÁMDI HONUM SO VÆL, AT HANN SEGÐI EITT GOTT STARV Í **NEW YORK** FRÁ SÆR OG **VARÐ VERANDI Í VÁGI**. EFTIR AT HAVA VERIÐ BURTUR Í 32 ÁR, HEVUR HANN NÚ VERIÐ AFTUR Í VÁGI – Í FØÐINGARDEGI HJÁ EINUM AV SÍNUM FYRRVERANDI SJÚKLINGUM



*Patil húskið treivst væl í Vági aftur. Vinstrumegin stendur Komi, í miðjuni, Ratan og høgrumegin, dótturin, Preeti*



**SJÁLDSAMUR GESTUR**
Áki Bertholdsen

– Veðrið er ræðuligt!!

Hetta var fyrsti tankin, sum fór ígjøgnum høvdið á indiska læknanum, Ratnakant Patil, tá ið hann ein hásummardag í 1970 fyri fyrstu ferð steig fótin á land í Føroyum.

Ratnakant, ella Ratan, sum hann vanliga verður nevndur, hevði tikið av einum tilboði um at verða kommunulækni í Vági í tríggjar mánaðir, áðrenn hann skuldi taka við starvi í New York.

Men hóast veðrið var ræðuligt, dámdi honum so væl í Vági, at tað var skjótt, at hann segði starvið í USA frá sær og varð verandi.

– Fólkið var einastandi fitt og her var so friðarligt, minnist hann aftur á gamlar dagar, tá ið Sosialurin nú ein dagin hitti hann á máli, tá ið hann hevði eina lítla móttøku í gamla bústaði sínum í Vági, sum nú er ein partur av barnaansingini í Vági.

Tað vóru ikki færri enn eini 70 fólk og heilsaðu upp á indisku læknahjúnini, men tey vóru eisini vællýdd í Vági, tí tey hava altíð borið orð fyri at vera serstakliga fitt fólk, vinarlig, blídlig og opin fyri øllum nýggjum.

Tá ið Patil, sum hann vanliga er nevndur í Vági, hevði lokið prógv sum lækni og hevði arbeitt eina tíð, hevði síðst í sekstiárunum fingið starv í London, har hann arbeiddi í eitt ár.

Í 1970 hevði hann fingið starv sum lækni í New York, men hann skuldi ikki taka við fyrrenn seks mánaðir seinni.

– Sostatt hevði eg eitt glopp í kalendaranum upp á eitt hálvt ár, sum eg skuldi royna at fáa at ganga, sigur hann.

Hann sigur, at hann hevði altíð viljað sæð Norðurlond og ein dagin, hann blaðaði í einum læknatíðarriti, sá hann eina pinkalítla lýsing, har søkt varð eftir kommunulækna í Vági í Føroyum.

Hann hevði ikki minstu hóming av, hvat Føroyar var fyri nakað, men eftir at hava granskað eitt landakort, fann hann nakrar smáar blettir mitt í Norðuratlantshavi.

– Vit bæði, konan og eg, tosaðu aftur og fram um hetta og mest av berum forvitni vórðu vit samd um at royna.

» Veðrið var ræðuligt, men fólkið var fitt